


# SLØKK TOSTAN

# TENDRA TILVITIÐ

vatn

UMHVØRVISVIKAN

4.-11. MAI 2024

# LEYGARDAGUR 4. MAI



**11.00** **Bjørg Dam, forkvinna í Náttúru- og umhvørvisnevnd Tórshavnar býráðs, setir Umhvørvisvikuna á Vaglinum**

Plantið eitt træ (í Havn). Tórshavnar kommuna letur borgarum ókeypis plantupakkar.
Á bygd verður útlutan av plantupakkum leygardagin 11. mai.

Plantumarknaður við føroyskt framleiddum plantum í Tinghúsgarðinum.

Staðbundin matmarknaður í Gongugøtuni.

**11.00** **Kom og royn kajakkrógving**

Havnar Kajakkfelag skipar fyri styttri túrum undan Bryggjubakka frá kl. 11.00 til 14.00.

Túrarnir eru ókeypis.

**11.00** **Túrar við teinæringi**

Felagið Teinæringur skipar fyri styttri túrum innanfyri Molan frá kl. 11.00 til 14.00. Túrarnir byrja við flótibrúnna úti í Bakka.

Túrarnir eru ókeypis.

**14.15** **Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

**15.00** **Gongutúrur runt Hvítanes**

Ein léttur túrur fyri alla familjuna við ferðaleiðara. Vit møtast við bussskýlið og ganga eftir gøtunum út á nesið og síggja, hvar fólk hava tikið sand til at byggja eitt nú múrin í Kirkjubø.

Bussleið nr. 3 koyrir úr Steinatúni kl. 14.46.

Túrurin er ókeypis. Tilmelding á torsinfo@torshavn.fo ella tel 302425.

# SUNNUDAGUR 5. MAI

**12.00 Barnabio: "Blekkulf"**

Teknistova og teknifilmur fyri tey yngstu.

Umhvørvishetjan Blekkálvur veit alt um stóra týdningin, vatn hevur fyri menniskju og náttúruna, og hvussu hesi eru tengd at hvørjum øðrum. Blekkálvur er ein høgguslokkur, sum saman við vinunum Sprelline, Pelle og Svanhild, lærir okkum um umhvørvið og serliga um dálking av havinum.

Talan er um norskan teknifilm fyri tey yngstu. Filmurin verður vístur í Norðurlandahúsinum hvønn heilan tíma.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 12.00 til 17.00.

**14.15 Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

**14.30 Útferð út í Hest við Westward Ho**

Gongutúrur við ferðaleiðara niðan á Snið, út á vøtnini og oman á Skarð, Hestur. Gongutúrurin tekur uml. 2,5–3 tímar, og er miðal léttur at ganga.

Vit viðmæla ikki túrin til smá børn og illa gongd. Øll fáa ein góðan matpakka við.

Farið verður av Høgukai klokkan 14.30.

Túrurin er ókeypis. Tilmelding á torsinfo@torshavn.fo ella tel 30 24 25.

# MÁNADAGUR 6. MAI

**8.30 og 10.00**

**Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri 1.-4. flokkar í Tórshavnar kommunu**

Tilmelding á fabrikkin@torshavn.fo

**9.00 og 11.00**

**Vitjan á vatnverkinum í Villingadali**

Tiltak fyri 5. flokkar í Tórshavnar kommunu.





**10.00 Veiðuferð á Býarbókasavninum**

Finn 15 føroyskar fiskar og vinn eina tráðu og ein bjargingarvest.

Býarbóksavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir føroyskum fiskum á barnabókasavninum. Øll, sum luttaka, fáa eina brosju og eru við í lutakasti um at vinna eina tráðu og ein bjargingarvest. Tríggir hepnir vinnarar verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum stutt eftir 11. mai.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 10.00 til 20.00.

**14.15 Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

**19.00 Gongutúrur til Nykatjørn og niðan á Stórareyn**

Bussur fer av Vaglinum klokkan 19.00. Av Oyggjarvegnum verður gingið fram við Nykatjørn, og frásøgufólk fer at greiða frá jarðfrøðini í økinum – syllar, gjáir og jatnagarðar.

Túrurin er ókeypis. Tilmelding á torsinfo@torshavn.fo ella tel 30 24 25.

19.30 **Hugnakvøld við framløgum á Sjósavninum**

"Framløga av ætlanunum um nýtt sjósavn og granskinardepil"
við Heina Hátún, stjóra á Føroya Sjósavni.

"Taraaling og burðardygg framleiðsla í sjónum".
við Agnes Mols Mortensen, lívfrøðingi og eigara av TARI Spf.

Tiltakið er ókeypis.

# TÝSDAGUR 7. MAI

**8.30 og 10.00**

**Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri**
**1.–4. flokkar í Tórshavnar kommunu**

Tilmelding á fabrikkin@torshavn.fo



**9.00 og 11.00**

**Vitjan á vatnverkinum í Villingadali**



Tiltak fyri 5. flokkar í Tórshavnar kommunu.

10.00 **Fyrilestrar og rundvísing á Vinnuháskúlanum**

"Havmyndil fyri bæði ytru og innaru leiðirnar" við Jari í Hjøllum, námslektara og Knud Simonsen, lektara, Fróðskaparsetur Føroya.

"Broytingar í vistskipanini á Landgrunninum og havstreymar"
við Sólvá Jacobsen, lívfrøðingi og Ph.d. lesandi.

Vinnuháskúlin bjóðar ein drekkamunn. Eftir fyrilestrarnar verður rundvísing, har møguleiki verður at síggja skúlan.

### 10.00 Veiðuferð á Býarbókasavninum

Finn 15 føroyskar fiskar og vinn eina tráðu og ein bjargingarvest.

Býarbóksavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir føroyskum fiskum á barnabókasavninum. Øll, sum luttaka, fáa eina brosju og eru við í lutakasti um at vinna eina tráðu og ein bjargingarvest. Tríggir hepnir vinnarar verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum stutt eftir 11. mai.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 10.00 til 20.00.

### 14.15 Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

### 17.00 Kom við ein kajakktúr

Havnar Kajakkfelag skipar fyri túrum av Álakeri, um viðrar.

Túrarnir eru ókeypis. Tilmelding á havnarkajakk@gmail.fo

### 19.00 Evniskvøld og handan av umhvørvisstuðli á Reinsarínum

"Vatn sum tilfeingi" við Bjørn Holm, vatnmeistara í Tórshavnar kommunu.

"Ber til at hava vatntrot í Føroyum?" við Lis Mortensen, náttúrulandafrøðingi, Jarðfeingi.

Livandi tónleikur við Annu & Angeliku.

Bjørg Dam, forkvinna í Náttúru- og umhvørvisnevnd Tórshavnar býráðs, handar umhvørvisstuðulin og grønu virðislønina hjá Tórshavnar kommunu. Eisini verður Grøna gávan frá Etika latin.



# MIKUDAGUR 8. MAI



**8.30 og 10.00**

**Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri 1.–4. flokkar í Tórshavnar kommunu.**

Tilmelding á fabrikkin@torshavn.fo

**9.00 og 11.00**

**Vitjan á vatnverkinum í Villingadali**

Tiltak fyri 5. flokkar í Tórshavnar kommunu.

**10.00** **Ruddingardagur fyri skúlar, virki og stovnar í Tórshavnar kommunu**

Møguleiki er at vinna eitt gávukort á 6.000 kr. Lutakast verður ímillum tey, sum hava meldað til.

Tilmelding á www.torshavn.fo/ruddingardagar

**10.00** **Veiðuferð á Býarbókasavninum**

Finn 15 føroyskar fiskar og vinn eina tráðu og ein bjargingarvest.
Býarbóksavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir føroyskum fiskum á barnabókasavninum. Øll, sum luttaka, fáa eina brosju og eru við í lutakasti um at vinna eina tráðu og ein bjargingarvest. Tríggir hepnir vinnarar verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum stutt eftir 11. mai.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 10.00 til 20.00.

**14.15** **Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

**19.00 Fyrilestrar og framsýning á Tjóðsavninum**

"Botndjór á Havnarvág" við Áka Vang.

"Týdningarmiklu vátlendini" við Kolbrún í Haraldsstovu.

"Vatnfuglar í Føroyum" við Jón Aldará.

Tjóðsavnið bjóðar drekkamunn eftir framløgurnar. Eisini verður møguligt at vitja framsýningarnar.

Tiltakið er ókeypis. Opið er til kl. 20.30.

**20.00 Filmsýning: "Før stormen"**

Í sambandi við Umhvørvisvikuna hjá Tórshavnar kommunu sýnir Filmsfelagið filmin, ið lýsir íbúgvarnar á oynni Mandø í Vadehavet, Vaðilin, sum røkkur frá Esbjerg til Den Helder í Niðurlondum, har heitið er Waddenzee. Úr túninum eygleiða tey veðurlagsbroytingarnar, tá ódn og vatnflóð herja á. Hóast hesar hóttanir, tvíhalda tey eins og forfedrarnir um gerandisdagin á oynni.

Katrin Helmsdal frá Tórshavnar kommunu bjóðar vælkomin og Katrin Petersen innleiðir filmin, sum verður vístur í Havnar Bio.

Ókeypis atgongumerki eru at fáa á www.bio.fo – avmarkað nøgd.

# HÓSDAGUR 9. MAI

**14.00 Ársdagur fyri viðarlundir í Havn**

Í sambandi við at ávikavist 90 og 50 ár eru liðin síðani viðarlundirnar í Kerjum, í Havnardali og í Grið vórðu gróðursettar, skipar Tórshavnar kommuna fyri hátíðarhaldi í Grið, har allar tríggjar viðarlundirnar verða umrøddar.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, heldur røðu.

Jóhann Mortensen, formaður í Skógfriðingarnevndini, heldur røðu

Harmonikufelagið spælir tónleik.

Tórshavnar kommuna bjóðar okkurt gott til góman.

**14.15 Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

# FRÍGGJADAGUR 10. MAI

**10.00 Veiðuferð á Býarbókasavninum**

Finn 15 føroyskar fiskar og vinn eina tráðu og ein bjargingarvest.

Býarbóksavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir føroyskum fiskum á barnabókasavninum. Øll, sum luttaka, fáa eina brosju og eru við í lutakasti um at vinna eina tráðu og ein bjargingarvest. Tríggir hepnir vinnarar verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum stutt eftir 11. mai.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 10.00 til 18.00.

**10.15 og 14.15**

**Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 10.00 til 15.00.

**16.00 Vitja taraframleiðsluna hjá Ocean Rainforest í Kaldbak**

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 16.00 til 20.00.





**15.00 Gongutúrur til Vatnverkið í Villingadali og Fransatoftir**

Ein lættur túrur fyri alla familjuna við ferðaleiðara. Túrurin byrjar við ovasta busssteðgistað á Villingadalsvegnum. Síðani verður gingið fram við Villingadalsfossinum til opið hús á Vatnverkinum.

Frá Vatnverkinum gongur leiðin víðari til Fransatoftir, har fólk helst hava goymt seg fyri sjórænarum. Útsýnið er gott, og tað hevur verið lætt at sæð um fremmand skip nærkaðust.

Túrurin er ókeypis. Tilmelding á torsinfo@torshavn.fo ella tel 30 24 25.

# LEYGARDAGUR 11. MAI

**9.00 Almennur ruddingardagur**

Vit taka eitt felags tak fyri náttúruna, og fara út at rudda.

Bólkar, so sum eigarafeløg, grannaløg, ítróttarfeløg, skótar og onnur hava møguleikan at vinna eitt gávukort á 6.000 kr. Lutakast verður ímillum tey, sum hava meldað til.

Tilmelding á www.torshavn.fo/ruddingardagar

Plantið eitt træ (á bygd)

Tórshavnar kommuna letur borgarum ókeypis plantupakkar.

Í Havn verður útlutan av plantupakkum leygardagin 4. mai.



**10.00 Veiðuferð á Býarbókasavninum**

Finn 15 føroyskar fiskar og vinn eina tráðu og ein bjargingarvest.

Býarbóksavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir føroyskum fiskum á barnabókasavninum. Øll, sum luttaka, fáa eina brosju og eru við í lutakasti um at vinna eina tráðu og ein bjargingarvest. Tríggir hepnir vinnarar verða kunngjørdir á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum stutt eftir 11. mai.

Tiltakið er ókeypis. Opið er frá kl. 10.00 til 17.00.

**14.15** **Rundvísing á Sjósavninum (fyri børn og vaksin)**

Lær alt, sum er vert at vita, um fiskarnar, gággurnar, krabbarnar, állarnar og tey mongu djórasløgini, sum búgva á sjósavninum. Um umstøðurnar tala fyri tí, verður møguligt at hyggja, ímeðan fiskarnir verða fóðraðir.

Ókeypis atgongd. Opið er frá kl. 14.00 til 17.00.

**16.00** **Hugnaløta á Bókasavninum í Kollafirði**

Kom og njót ein drekkamunn omaná ruddingardagin afturvið einum áhugaverdum fyrilestri og góðum tónleiki.

"Grundvatn í Føroyum – møguleikar og avbjóðingar"
við Óluvu R. Eidesgaard, jarðfrøðingi, Jarðfeingi.

Livandi tónleikur við Signari í Homrum.



vatn

UMHVØRVISVIKAN

4.-11. MAI 2024